Vælkomin til dyst í Fløtugerði



Leikskrá nr.9

Sunnudagur 19. juni 2016

Mynd: Álvur Haraldsen

# Dysturin í dag

Birgir Petersen
ábyrgdarblaðstjóri



Dysturin í dag Vælkomin til Effo-dyst á Fløtugerði í Fuglafirði.Í dag taka vit móti aldurforsetanum TB, sum hava verið í tungum sjógvi alt kappingarárið og hava skift venjara undan seinasta umfarinum. Robert Roelofsen valdi at biðja um at verða loystur úr starvi vegna væntandi úrtøku. Í hansara stað er navnframi Sigfríður Clementsen, ið er ein av teim allarmest royndu venjarunum í føroyskum fótbólti í nýggjari tíð. TB fingu fulla úrtøku í fyrsta dystinum við honum við róðrið, og var hetta enntá móti mætu NSÍ, so er bara at hopa fyri okkara part at sokallaða venjareffektin ikki fer at ganga út yvir okkum. Okkara menn høvdu framsýning í Fløtugerði seinasta vikuskift í hvussu man kann lata eitt lið úr, ífótbóltssamanhagi. B68 blivu sendir út um Eiðið aftur við einum 0-4 avsmurningi, og kundi sigurin sagtans verið mangt slíkt. Tað, sum vit mugu ansa eftir er at ikki gerast alt for yvirlegnir orsaka av hesum, tí B68 hava hóast alt ikki víst tað heilt stóra móti nøkrum øðrum liði í ár.Nú mugu vit halda fast við góðu gongdina seinastu tíðina, tí nú eru vit knappliga við at nærkast 4.plássinum, sum fer at geva okkum møguleika at leika úti í Europa næsta ár.Koyrið á drongir. Góðan dyst øll somu

*Birgir*

Í 2015 gekk tað soleiðis

| | | | |
|---|---|---|---|
| 8 | 26-04-2015 | TB-ÍF | 1-1 |
| 14 | 31-05-2015 | ÍF-TB | 2-0 |
| 23 | 30-08-2015 | TB-ÍF | 1-1 |

(TB var í fyrstu deild í 2014)

Í 2013 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7 | 25-04-2013 | TB-ÍF | 2-2 |
| 16 | 21-07-2013 | ÍF-TB | 4-3 |
| 20 | 18-08-2013 | TB-ÍF | 0-1 |

Í 2012 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 6 | 29-04-2012 | TB-ÍF | 1-0 |
| 11 | 10-06-2012 | ÍF-TB | 1-1 |
| 22 | 02-09-2012 | TB-ÍF | 1-2 |

Í 2007 gekk tað soleiðis: (1.deild)

| | | | |
|---|---|---|---|
| 9 | 12-05-2007 | TB-ÍF | 1-1 |
| 15 | 30-06-2007 | ÍF-TB | 4-1 |
| 21 | 25-08-2007 | TB-ÍF | 4-2 |

Í 2005 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 6 | 01-05-2005 | ÍF-TB | 1-0 |
| 18 | 07-08-2005 | TB-ÍF | 0-1 |
| 27 | 22-10-2005 | ÍF-TB | 0-0 |


ÍF
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

LEIKSKRÁIN:
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: Hildur Høghamar



HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# Tippikapping

Aftur í ár fara vit at hava eina tippikapping, har tú hevur møguleika fyri at tippa komandi umfar í effo deildini, umframt ein av málskjúttunum pr. dyst. Reglurnar fyri at luttaka eru sera einfaldar: Tú tippar allar dystirnar, umframt at tú skrivar navnið á einum leikara, ið tú væntar megnar at skjóta eitt mál. Skriva síðan navn og telefonnummar á seðilin, og lat hann inn í kioskina í ítróttarhúsinum seinasta lagi 15 minuttir eftir at dysturin í dag er liðugur. Lutakast verður síðan ímillum teir seðlar, ið hava flest rætt svar. Drigið verður fyri hvønn triðja heimadyst, og verður vinnarin uppringdur.

| Heimalið | Útilið | 1 | X | 2 | Málskjútti |
|---|---|---|---|---|---|
| TB | Víkingur | | | | |
| KÍ | AB | | | | |
| **Skála** | **ÍF** | | | | |
| HB | B68 | | | | |
| NSÍ | B36 | | | | |
| Navn: | | | | | |
| Telefonnummar | | | | | |





## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

NORÐOYA SPARIKASSI



www.ns.fo

Netbankin sum app
skanna kotuna

Ert tú lesandi í Føroyum ella uttanlands, er lætt at avgreiða fíggjarligu viðurskifti tíni í Norðoya Sparikassa.

Bílegg eitt ungdómsprát á tel. 47 5000

UNG 13-25 NemKonta Netbankin Gjaldkort Ráðgeving

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

Linde Gas AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

Opnigstíðir:
Mána. - Fríggjadag
8:00 – 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

www.gassola.fo



# Tá Árni gav Sverra reytt kort

Niels Petersen


Mynd: FSF

Í onkrum av ungdómsárunum, giti at tað var í Smádreingjadeildini, skuldu vit einaferð spæla í Fuglafirði. Venjari okkara var navnframi Sverri Midjord, og hann var fyr og flamme beinanvegin í dystinum, tá hann helt at dómarin, Árni Vang var eitt sindur partískur. Sverri var jú ongantíð partískur.

Dysturin leið, og Sverri bleiv malskari á síðulinjuni. Tá so ÍF fekk eitt mál, sum sá út til at vera hálvan kilometur offside, kókaði yvir hjá ágrýtna venjaranum. Men hvat fekk hann burturúr tí. Eina burturvísing. Eg minnist, at vit leikarar stóðu hálvgum skelkaðir, men Árni var hvørki til at høgga ella stinga í. Hann hevði tikið avgerðina, og soleiðis bleiv tað verandi.

Men hvat..... Sverri fór niðan á vegin at brøla, og haðani var yvirblikkið enn betur.

Minnist ikki stórt annað frá dystinum, annað enn hesa merkisverdu hending.

Forrestin fekk eg sjálvur gult kort í dystinum. Mestum hevur tað verið fyri kjaftaslit

### TB-ÍF vígdu vøllin við Stórá

Annars minnist eg væl aftur á fyrsta dystin sum spældur var við Stórá. ÍF fekk heiðurin at gerast fyrsta motstøðulið hjá TB. Tað var 29. apríl í 2012. Hetta árið bleiv ÍF nummar tvey í landskappingini, bert fýra stig aftanfyri EB/Streym. Men í Trongisvági taptu fuglfirðingar 0-1. Einsamalla málið skoraði Dimitri Jankovic, eftir bert seks minuttum. Eg varpaði sjálvur dystin út fyri Kringvarpið, og tað varð rópt hart og longi

# Tips 13

Tips 13 er kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Hvør spurningur gevur 1 stig. Spælt verður eftir "vinnarin situr"-leistinum. Ein leikari luttekur hvørja ferð, og spælir hann í móti einum, ið á ein ella annan hátt, hevur okkurt við ÍF at gera. Verður svarað skeivt uppá spurningar, sum beinleiðis hava við ÍF at gera, telur tað hálvt minusstig. Endar tað við javnleiki, verður eykaspurningur gjørdur, ið hevur eitt talvirði. Vinnarin er so viðkomandi, ið gitir nærmast rætta svarinum.

Eftir sigurin á Andy í síðstu leikskrá, var tað Andrias, sum bjóðaði av. Rúni vísti, at hóast aldurin nærkast teimum 40, so var tað eingin forðing. Fyrrverandi formaðurin vann sannførandi 7-4,5, hóast hann hevði 2 spurningar um ÍF skeivar. Kambsdalsbúgvarnir, hóast tann eldri er í útlegd, valdu ikki at seta nakað uppá spæl. Samlaða støðan er nú 8-1 til fjeppararna, og Rúni verður aftur á skránni, tá fyrsti heimadystur eftir summarsteðgin verður spældur.

Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | AP | RP |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kekkiski Tomas Rosicky hevur eitt eyknevnið, sum er uppkallað eftir einum tónleikara. Hvør er tónleikarin? | Elvis Presley | Justin Timberlake | Wolfgang Amadeus Mozart | 1 | 1 |
| 2 | Í vikuni boðaði ein norskur leikari frá, at hann takkað fyri seg sum yrkis leikari. Hvør er leikarin? | John Arne Riise | Morten Gamst Pedersen | Brede Hangeland | 0 | 1 |
| 3 | Hvørjum blusunummarið spælir kroatiski landsliðsliðskiparin Darijo Srna við, tá hann umboðar Kroatia í EM? | 2 | 11 | 22 | 0 | 0 |
| 4 | Hvat ár spældi Gunnar Nielsen sín fyrsta landsdyst fyri Føroyar? | 2009 | 2008 | 2007 | 0 | 1 |
| 5 | Hvør skeyt tað síðsta málið, sum besta liðið hjá ÍF fekk í 20. øld? | Áslakur R. Petersen | Rógvi Róin | Ken Bærentsen | 1 | 1 |
| 6 | Úr hvørjum felagi keypti Liverpool Xabi Alonso? | Osasuna | Real Sociedad | Real Zaragoza | 0 | 1 |
| 7 | Hvat landslið umboðaði Frédéric Kanouté? | Frakland | Senegal | Mali | 0 | 0 |
| 8 | Hvør fyrrverandi landsliðsleikari er venjari hjá brasilska landsliðnum? | Dunga | Cafú | Juninho | 1 | 1 |
| 9 | Hvussu nógv mál skeyt Hanus Thorleifsson fyri ÍF? | 0 | 1 | 2 | -0.5 | -0.5 |
| 10 | Hvør av hesum leikarunum hevur spælt flestar landsdystir? | Daniel Agger | John "Faxe" Jensen | Nicklas Bendtner | 0 | 0 |
| 11 | Hvat av hesum feløgum hevur Paul Gascoigne ikki umboðað? | Burnley | Tottenham | West Ham | 0 | 1 |
| 12 | Hvør av hesum leikarum hevur flest dystir í bestu deildini fyri ÍF? | Torstein Joensen | Erling Joensen | Kristian Petersen | 1 | -0.5 |
| 13 | Til hvat felag seldi Chelsea Demba Ba til? | Besiktas | Bursaspor | Shanghai Shenhua | 1 | 1 |
| | **Tilsamans** | | | | **4.5** | **7** |

Rætt svar: 2 – 1 – X – 1 – 2 – X – 2 – 1 – X – 1 – 2 – X – 1




**Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.**

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

*...og nógvar aðrar tænastur*

**Fuglafjarðar kommuna**


usedbaader.biz
BAADER service
OG SMIÐJUARBEIÐI
Okkara vælútgjørda smiðja niðan fyri Bedingina í Fuglafirði megnar allar vanligar smiðjuuppgávur, stórar sum smáar.
Umframt sjálva smiðjuna hava vit stóra goymslu við rustfríum tilfari, ketum, legum, gearum, motorum o.s.fr.
Ring til okkara á 775 775, ella vitja okkara heimasíðu: www.pl.fo fyri at fáa meira at vita.
BAADER Food Processing Machinery
fomaco
Ubro SystemPac
euskan++
Tel 775 775
www.pl.fo
peturlarsen


CAPTO
TIL FLÓTITROL
RÆTTILIGA FANGANDI
CAPTO er ein nýggjur nettráður til flótitrol sum VÓNIN hevur ment.
Set teg í samband við okkum fyri at hoyra meira. Sí www.vonin.com
VÓNIN®


Vit gera
– vegir
– gongubreytir
– tún
– parkeringsøkir o.a.
Vit planera og fresa eisini
www.hj.fo
HJ ASFALT SP/F
Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179


Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið
SK
SVENDKROSSTEIN
Pf. Svend Krosstein • Falkavegur 6 • Postboks 3229 • FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 • Fax +298 344 601 • www.krosstein.fo • krosstein@krosstein.fo
SENDISTOVAN

## HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| 18/6/16 | NSÍ-Víkingur |
| **19/6/16** | **ÍF-TB** |
| 19/6/16 | B36-KÍ |
| 19/6/16 | B68-Skála |
| 19/6/16 | AB-HB |

## KOMANDI UMFAR:

| | |
|---|---|
| 24/6/16 | TB-Víkingur |
| 24/6/16 | KÍ-AB |
| **24/6/16** | **Skála-ÍF** |
| 24/6/16 | HB-B68 |
| 24/6/16 | NSÍ-B36 |

## TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|
| Klæmint A. Olsen | 13 | NSÍ |
| Jóannes Bjartalíð | 12 | KÍ |
| Páll A. Klettskarð | 10 | KÍ |
| Filip Djordjevic | 6 | Vík. |
| Róaldur Jakobsen | 6 | B36 |
| Sølvi Vatnhamar | 6 | Vík. |
| **Adeshina A. Lawal** | **6** | **ÍF** |
| Albert Adu | 6 | TB |
| Patrik Johannesen | 5 | AB |
| Jógvan A. Skeel Nolsøe | 5 | B36 |

## MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | Mál |
|---|---|
| Adeshina A. Lawal | 6 |
| Clayton Soares do N. | 4 |
| Bogi Reinert Petersen | 4 |
| Dánjal á Lakjuni | 3 |
| Andy Ó. Olsen | 2 |
| Poul N. Mikkelsen | 1 |
| Ari Ó. Ellingsgaard | 1 |

## STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 14 | 10 | 2 | 2 | 27 | 10 | 17 | 32 |
| 2 | Víkingur | 14 | 8 | 4 | 2 | 28 | 16 | 12 | 28 |
| 3 | B36 | 14 | 7 | 5 | 2 | 24 | 13 | 11 | 26 |
| 4 | NSÍ | 14 | 8 | 0 | 6 | 30 | 23 | 7 | 24 |
| **5** | **ÍF** | **14** | **6** | **3** | **5** | **24** | **28** | **-4** | **21** |
| 6 | HB | 14 | 5 | 4 | 5 | 19 | 17 | 2 | 19 |
| 7 | TB | 14 | 3 | 4 | 7 | 14 | 22 | -8 | 13 |
| 8 | Skála | 14 | 3 | 4 | 7 | 12 | 20 | -8 | 13 |
| 9 | AB | 14 | 1 | 6 | 7 | 15 | 21 | -6 | 9 |
| 10 | B68 | 14 | 0 | 6 | 8 | 13 | 36 | -23 | 6 |



| | | |
|---|---|---|
| 1 | Andrias Poulsen | |
| 2 | Gunnar Christiansen | |
| 3 | Poul N. Mikkelsen | |
| 4 | Alex Jose dos Santos | |
| 5 | John Daniel Guðjónsson | |
| 6 | Karl A. Løkin | |
| 7 | Dánjal á Lakjuni | |
| 8 | Bogi R. Petersen | |
| 9 | Kristoffur Jakobsen | |
| 10 | Ari Ó. Ellingsgaard | |
| 13 | Hallgrím G. Hansen | (M) |
| 14 | Dánjal Pauli Højgaard | |
| 15 | Oliver Korch | (M) |
| 17 | Leivur Joensen | |
| 18 | Clayton Soares do Nascimento | |
| 23 | Andy Ó. Olsen | |
| 27 | Margeir Toftegaard | |
| 28 | Hanus Eliasen | |
| 30 | Adeshina A. Lawal | |
| 37 | Jan Ó. Ellingsgaard | (L) |
| 80 | Tóri T. Traðará | (M) |

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Meinhardt Joensen* | (M) |
| 2 | Absalon Eliasen | |
| 3 | Signar H. Olsen | |
| 4 | Árni Rúnar Ørvarsson | |
| 5 | Ragnar Joensen | |
| 6 | Rógvi Joensen | (L) |
| 7 | Teitur Justinussen | |
| 8 | Hávar Albinus | |
| 9 | Salmundur Bech | |
| 10 | Albert Adu | |
| 11 | Eirikur M. Ellendersen | |
| 14 | Andrias Sørensen | |
| 15 | Teitur Olsen | |
| 17 | Petur Mortensen | |
| 18 | Heini M. Mortensen | |
| 19 | Kofi Appiah | |
| 20 | Bárður A. Dimon | |
| 21 | Ndende Adama Gueye | |
| 23 | Herve Din Din | |
| 24 | Carl M. Bech | |
| 27 | Martin Midjord | |

| | |
|---|---|
| Venjari | Jákup Mikkelsen |
| Venjari | Símun Eliasen |
| Liðleiðari | Ólavur Larsen |
| Liðleiðari | Trúgvi Nesá |
| Liðleiðari | Dan Petersen |

| | |
|---|---|
| Venjari | Sigfríður S. Clementsen |
| Hjálparvenjari | Karl Øster |
| Liðleiðari | Thorbjørn Hermansen |
| Fysioterapeut | Lív D. Michelsen |

Bóltstuðul er Marin og Rasmus Joensen

Dómari: Petur Reinert
Hjálpardómarar: Dia Lamhauge, Jørleif Djurhuus
4. dómari: Rúni Gaardbo
Eygleiðari: Jónfinn


sponsored
by
INTERSPORT®
Thomas Dam ítróttur


Tróndur í Gøtu
Leiðandi reiðarí
í norðurhøvum
Finnur Fríði
Jupiter
Tummas T
Saksaberg
VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tlf: 610600
Faks: 441650 | vardin@vardin.fo | www.vardin.fo


pls.fo
SPORA BILIN
OG FÁ GLEÐI AV FYRIMUNUNUM
1. Minni slit av dekkunum
2. Lægri brennievnisnýtslu
3. Høgligari túrar
UPPMÁTING PR. AKSIL U/MVG 475,-
SPORING EFTIR AVTALU
RING 765 765
OG AVTALA TÍÐ
stórbilar
verkstaður & søla
Tel 765 765 · www.pls.fo

VEST PACK
VEST PACK
...meira enn pakkitilfar!

- Arbeiðsklæðir
- Kjølsvín
- Balliplast
- Oljusperringar
- Pakkimaskinur
- og meira afturat

Høvuðsvirkisøkið hjá Vest Pack er plast- og etikett framleiðsla. Seinnu árini hevur Vest Pack eisini verið heildarveitari av pakkitilfari og tí, sum fylgir í kjalarvørrinum av tí - tvs. at veittar verða eisini vørur, sum ikki eru partur av sjálvari framleiðsluni, so sum pappeskjur, blokkumsløg, pakki-maskinur osv.

Styrkin hjá Vest Pack er millum annað fleksibilitetur, eitt nú av tí, at vit hava framleiðsluna í húsinum og ikki hinumegin víða hav. Somuleiðis kunnu vit tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, eitt nú hvat víðvíkur nøgdum, har vit hava eitt lægri minstamark fyri serframleiðslu enn okkara kappingarneytar uttanlands. Vest Pack er ISO 9000 góðkent - eisini framleiðslan.

FO-350 Vestmanna · Faroe Islands · Telefon +298 42 41 07 · www.vestpack.fo

Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald

**Bilverkstaðið á Kambsdali**
**Tlf. 441111**



Ætlar tú at selja tíni hús í Fuglafirði ?

- vit hava keyparar, ið bíða

Niels Finsensgøta 37
Tórshavn | Tel 348 900
inni@inni.fo | inni.fo

INNI

**Vitja handil okkara á Hjalla**

Her fær tú alt innan vask og reingerð á einum stað



**KEMILUX**
www.kemilux.fo



# Eitt minni av Sevmýru

Magnus Jørmundsson

Nú aldursforsetin og undangongufelagið í føroyskum fótbólti er á vitjan, skulu vit nýta høvið at skriva eina stutta søgu, um eitt lið av ungum dreingjum, ið skuldi spæla á Sevmýru. Árstøl og fakta er kanska ikki fullfíggjað, tí minni hjá greinaskrivaranum kann lumpa.

Stutt inni í hesi øldini, fóru vit sum tá spældu í deingjadeildini, og nú kallast U16, ein langvegis túr at spæla fótbólt. Fyri okkum var bara vanligt, at vit spældu her norði. Til og við piltadeildina spældu vit so at siga bara móti GÍ, LÍF og KÍ. Í smádeingjum sloppu vit onkran longri tein, men tað var ikki fyrr enn í dreingjadeildini, at vit veruliga sloppu at royna okkum móti øllum Føroyum.

Sjálvur var eg partur av yngra árganginum hjá okkum, og leiðin gekk suður á Sevmýru at spæla móti TB. Farið var tíðliga um morgunin úr Fuglafirði – fyri summar, alt ov tíðliga. Komnir umborð á Smyrli blivu allar taskurnar lagdar á bildekki, og liðið fór uppá at fáa sær ein bita. Komnir nakað ávegis kemur onkur okkara í tankar um, at tann, ið hevði vaskað klæðini eftir síðsta dyst, ikki var við til hendan dystin. At standa umborð á Smyrli, hálvvegis til Suðuroynna uttan spæliklæðir var ikki ein støða, sum nakar okkara hevði ímyndað sær at komið í. Av tí at vit vóru so tíðliga avstað, so vóru tó nakrir tímar til dysturin skuldi byrja, so vit høvdu tíð at finna eina loysn. Eingin av okkum hevði nakra útgerð til ein spælibúna við, av tí at felagið stutt áðrenn hevði keypt klæðir til alla barna- og ungdómsdeildina. Tá vit so komu á Sevmýru var onkur barnakapping í gongd, so vit fingu kært okkara neyð til umboð úr TB. Viðkomandi helt so fyri, at nú vit vóru komnir allan vegin suður, so var tað bæði synd og skomm fyri bæði liðini, um eingin dystur bleiv spældur. TB lá ikki inni við eykablusum til okkum at spæla í, og av tí at øll liðini hjá bæði VB og Royn vóru norðanfjørðs, var hjálpin at finna í Sumba. Appelsingula felagið sunnast í Føroyum kom við spæliblusum, og venjarin hjá dreingjaliðnum hjá TB ornaði fyri, at sínir leikarar fóru heim eftir hvør sínum shortsi og hosum, sum vit so skuldu læna, fyri at dysturin kundi spælast.

Hvat úrslitið bleiv av dystinum, minnist eg ikki, men at síggja tann blíðskap og samstarvsvilja, sum vit sloppu at uppliva, hevur veruliga rótfest seg hjá fleiri av okkum. Eftir dysturin var liðugur, var so ein biti at fáa, og appelsinklæddu IF'ararnir minnast allir hendan dystin, ið fyri fleiri av teimum var fyrsti dystur, sum teir spældu á oynni.

Góðan dyst, øll somul.




Ein TRYGG rýmingarleið



Í húsum við fleiri hæddum sova vit ofta á loftinum.
Kyknar eldur, kann tað gerast ógjørligt at flýggja.
Í slíkum førum er tann kollveltandi MODUM brandstigin
ein trygg loysn og samstundis tín einasti útvegur.

Hann er heftur uttan á húsini og nærum ósjónligur,
tá ið hann er lagdur saman. Í neyðstøðu verður hann
lættliga latin upp, so tú skjótt og trygt kanst ganga niður.

Fæst í øllum longdum. Vit átaka okkum uppseting.

Fønix
Mykinesgøta 8 - 100 Tórshavn - Tel +298 311909




Jógvan Weihe

Stiðjagøta 10 · FO-100 Tórshavn
Tel. 35 38 97 · Fax 35 38 98

Salong Halda.fo

Tel. 44 23 00
Stallagøta 13
512 Norðragøta

Opið er:

| | |
|---|---|
| Mánadag | 9.00 - 17.00 |
| Týsdag | 9.00 - 19.00 |
| Mikudag | 9.00 - 19.00 |
| Hósdag | 9.00 - 18.00 |
| Fríggjadag | 9.00 - 17.00 |
| Leygardag | 9.00 - 13.00 |

Opið er eisini eftir avtalu

Online booking
www.salonghalda.fo



teknistovan GØTA

**Jens Kl. Jacobsen**
Far.: jkj 232343
jkj@teknistovan.fo

**Henning Olsen**
Far.: ho 232344
ho@teknistovan.fo

510 Gøta, Gøtuv. 2, Tel.: 442344 - teknistovan@teknistovan.fo - www.teknistovan.fo




KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

GER
SJÓLÍVIÐ
LÆTTARI

KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ Kósaskákið 3 FO-700 Klaksvík Tel. +298 472030 Fax: +298 472031 T-postur: kss@kss.fo www.kss.fo

## 5 av kvinnunum

| Navn | Aldur | Dystir | Mál |
|---|---|---|---|
| Sigrid Petersen | 27 | 117 | 3 |
| Marta S. Thomsen | 21 | 104 | 1 |
| Durita B. Nielsen | 20 | 103 | 4 |
| Dania S. A. Olsen | 20 | 70 | 22 |
| Jóhanna Egholm | 19 | 49 | 0 |



| | |
|---|---|
| Navn: | Tóri Tormóðsson Traðará |
| Føðingardagur: | 16. Juli 1996 |
| Føðistað. | Tórshavn |
| Starv. | Maskinsmiðjulærlingur |
| Pláss á vøllinum: | Málmaður |
| Yvirtrúgv: | nei |
| 3 orð sum lýsa teg: | Lekkur, sjarmerandi sjeikur |
| Torførasti mótstøðumaður: | Otto Reinert Petersen |
| Frítíðarítriv: | Fótbóltur |
| Vónir fyri 2016: | Enda í topp 4 |

## Tín Ítrótt:

| | |
|---|---|
| Fyrsti dystur á 1.liðið: | Ímóti KÍ í 2015 |
| Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF: | Eg byrjaði sum 6 ára gamal |
| Aðrar ítróttargreinar: | Onga |
| Minningarríkasti dystur: | AB á Argjum í 2016 |
| Størsta fótbóltsliga ávirkan: | Jákup Mikkelsen |
| Besti fótbóltsleikari: | Eg sjálvur |
| Um ikki fótbólt, hvønn ítrótt hevði tú so valt: | Kapproður |
| Hvat slag av venjing dámar tær best: | Alt uttan at renna |
| Hvat skal av venjing damar tær ikki: | At renna |

## Tínir favorittar:

| | |
|---|---|
| Matur og drekka: | Pizza og Sisu |
| Slag av tónleiki: | Alt uttan rapp |
| Sjónvarpssending: | Dagur & vika |
| At slappa av: | Við damuni |
| Troyggja nr. | 80 |
| Besti fótbóltsleikari nakrantíð: | Abraham Løkin |
| Filmstjørna: | Elin Løkin |
| Besta bók: | Playboy og Herviligi Henry |
| Stuttligasti persónur: | Mamma |
| Stuttligasti i hópinum. | Lawal |
| Besti ÍF áskoðari: | Omma ( Petra Elfrida Sedea Hansen) |

## Leikarafakta:

- Er systkinabarn til Karl og Boga A. Løkin
- Er beiggi til Urd, ið er á kvinnulandsliðnum í flogbólti
- Ábraham Løkin er mammubeiggi hansara
- Suni Hansen, sum er kent andlit í føroyskum flogbólti, er eisini mammubeiggi hansara
- Er skrásettur fyri 40 dystir og 2 gul kort – alt fyri ÍF
- Pápi Tóra, Tórmóður, er í nevndini hjá okkum
- Hevur 655 vinir á Facebook
- Hevði eina ógvuliga minniliga bjarging á útivølli móti MB í 3. deild
- Hevur hægsta blusunummar í Effo deildini

Álvaskot
Fysioterapi
v/Álvur Hansen
44 51 44

VØRDSLAN
WEARHOUSE
"...klæðir og skógvar til hennara
hansara og børnini, nú alt undir somu lon"

S/PF AP BUSSKOYRING
– altíð til dystin fús

Ring til okkum á
Tel 23 52 50 · buss@buss.fo



# JOHN's

KARVATOFTIR — FUGLAFJØRÐUR

# LIVANDI TÓNLEIKUR

HVØRT VIKUSKIFTI

ALTÍÐ **PUBQUIZ**

LEYGARKVØLD KL. 22

OG VIT VÍSA SJÁLVANDI

**DYSTIRNAR**!

**OPIÐ: FRÍGGJADAG 19—04 — LEYGARDAG 17—04 — SUNNUDAG 17—23**

FYLG VIÐ Á FACEBOOK / **JOHN'S Í FUGLAFIRÐI**